# Jákup setti eingi krøv

**A-LANDSLIÐIÐ** Brian Kerr gav einki lyfti og Jákup Mikkelsen hevði einki krav um spælitíð, tá avtalað varð, at royndi málverjin tók enn eitt tørn á landsliðnum. – Men eg bæði vóni og vænti, at eg spæli, sigur Jákup Mikkelsen erliga

Rólant Waag Dam

Tá Sosialurin tosaði við Jákup Mikkelsen, hevði hann enn ikki fingið boðini frá landsliðsvenjaranum, um at hann byrjar inni í kvøld.

– Eg havi ikki sett nakra treyt um, at eg skal vera fyrstaval, nú eg komi við aftur. Hetta hevur Brian Kerr heldur ikki lovað mær, at eg verðið. Men eg bæði vóni og vænti, at eg spæli dystin í kvøld, sigur Jákup Mikkelsen erliga úr telefonini úr Slovenia.

Annað hevði verið undarligt, men tað er óneyðugt at spekulera í hesum, tí tað verður Jákup Mikkelsen, sum verjir mál okkara í kvøld. Tað hevur Brian Kerr váttað fyri Sosialinum.

## Deiligt at vera aftur

Men hóast eingi lyfti um spælitíð, fegnaðist Jákup Mikkelsen, um at vera partur av landsliðnum aftur. – Tað er deiligt at vera við aftur. Mær hevur altíð dámað væl landsliðið og alt kring tað, og soleiðis er eisini nú, greiðir Jákup Mikkelsen frá.

– Men tað kann kanska vera, at hinir halda tað vera løgi, at eg eri við aftur, men soleiðis havi eg tað als ikki, leggur Jákup Mikkelsen flennandi aftrat.



*Jákup Mikkelsen verjir føroyska málið í kvøld, men tað er ikki nakað, hann hevur fingið lovað frammanundan, sigur hann*

Mynd: Rólant Waag Dam

## Tekur ikki kjansin frá nøkrum

Tað hevur fingið nógva umrøðu, at Jákup Mikkelsen aftur er partur av landsliðnum – í eina tíð um ikki annað. Tá Jákup Mikkelsen gavst á sinni, segði hann, at tað var fyri at geva Gunnari Nielsen plássið millum stengurnar. Spurningurin er so, um Jákup Mikkelsener ikki tekur kjansin frá Tórði Thomsen, nú Gunnar Nielsen ikki er tøkur?

– Nei, soleiðis síggi eg ikki upp á tað. Tað hava verið fýra málverjar aftrat mær á landsliðnum seinastu árini. Gunnar Nielsen, René Tórgarð, Meinhardt Joensen og Tórður Thomsen. Gunnar er skaddur, so har er einki at gera. René hevur verið smáskaddur í sera langa tíð, og Meinhardt hevur eisini havt sínar skaðar at dragast við. So er bara Tórður Thomsen eftir, men síðani HB skifti venjaran út, hevur hann ikki verið fastur maður har, greiðir Jákup Mikkelsen frá og leggur aftrat, at hann eingi krøv hevur sett, um at hann skal vera fyrstavalið millum stengurnar.

## Er væl fyri

Nú er tó greitt, at tað verður Jákup Mikkelsen, sum stendur millum okkara stengur í kvøld. Hesa uppgávuna er landsliðsmálverjin klárur til, hevur hann prógvað so seint sum í seinasta landskappingarumfarinum.

– Eg haldi, at eg eri væl fyri í løtuni. Eg havi drigist við ein trupulleika í lærkrikanum seinastu tríggjar vikurnar, men tað tykist ikki vera ein trupulleiki nú, sigur Jákup Mikkelsen, sum hevur góðar vónir til dystin í kvøld.

– Menn virka sum heild væl fyri, men eitt gott úrslit krevur, at vit allir gera okkara besta, sigur Jákup Mikkelsen.

# Arbeiða við taktiska partinum

**A-LANDSLIÐIÐ** Fróði Benjaminsen, liðformaður á føroyska landsliðnum, ger greitt, at leikararnir ikki mugu endurtaka somu mistøk, sum førdu til stórtapið móti Italia

Rólant Waag Dam

– Tá vit spældu móti Italia vóru tað fleiri leikarar, sum ikki spældu upp til sítt besta. Tað er altavgerandi, um vit ynskja at umganga líknandi stórtap, at tað ikki hendir aftur, sigur Fróði Benjaminsen.

Sambært honum vilja hann og liðfelagar hansara gera alt fyri, at tað ikki endurtekur seg.

– Tí hava vit eisini vant rímiliga nógva taktiska venjing, umfram videofunder og annað. Hetta fyri ikki at enda í somu støðum sum í hinum dystium, greiðir Fróði Benjaminsen frá.

## Lagið er gott

Annars letur liðformaðurin bara væl at umstøðunum í Slovenia.

– Hotellið er gott og tað er lagið eisini. Vit hava verið á stadion, sum tey siga verður fullsett, so tað sær eisini gott út. Undir venjing hava vøllarnir verið nakað bleytir orsaka av regninum, men tað kunnu vit ikki gera so nógv við. Hinvegin er vøllurin á stadion góður, vísir Fróði Benjaminsen á.



*Liðskiparin, Fróði Benjaminsen*

Mynd: Rólant Waag Dam

# Neyðugt við fleiri broytingum

**A-LANDSLIÐIÐ** Jákup Mikkelsen, Atli Gregersen, Fróði Benjaminsen og Jóan Símun Edmundsson byrja allir við vissu inni í kvøld, váttar Brian Kerr. Hinvegin er lítið sannlíkt, at Símun Samuelsen telist millum teirra. Vit hava tosað við landsliðsvenjaran, sum hevði nógv at hugsa um undan dystinum

Rólant Waag Dam

Eitt pláss í hvørji ketu var komið upp á pláss longu í gjárkvøldi. Landsliðsvenjarin kundi tá við vissu siga, at málverjin, stýrimaðurin í verjuni, liðformaðurin og álopsessið heilt víst byrja inni í kvøld. Men sambært Brian Kerr var rættiliga ógreitt við hinum sjey, og tað verður neyvan fyrr enn heilt upp undir dystarbyrjan, at seinastu avgerðirnar verða tiknar.

## Símun byrjar ikki inni

Undan seinastu venjingini, sum var í dag, var Símun Samuelsen so mikið skaddur, at hann eftir øllum at døma ikki byrjar inni í kvøld. Harumframt er tað eisini ógvuliga ivasamt við Johan Troest Davidsen hjá NSÍ. Verjuleikarin hevur trupulleikar við knænum, ið eru so mikið álvarsamir, at endalig niðurstøðan viðvíkjandi honum ikki verður tikin, fyrr enn beint fyri dystarbyrjan í kvøld.

Aftrat honum hevur Jann Ingi Petersen drigist við ein skaða seinastu vikurnar, sum hevur havt við sær, at heldur ikki hann er í fullbirgur.

Hesir tríggir, saman við Gunnari Nielsen, byrjaðu allir inni seinast føroyska landsliðið var í eldinum. Tað merkir so, at tað verður eitt munandi broytt føroyskt landslið, sum fer á vøllin í Ljubljana í Slovenia í kvøld, sammett við tað liðið, ið spældi í Florence í Italia fyri góðum mánaði síðani.

## Ivamál órógva

Øll hesi ivamál arga landsliðsvenjaran.

– Sum nú er má eg bíða eftir niðurstøðunum frá læknunum og fysioterapeutunum, og so sjálvandi eisini kanna eftir, hvussu leikararnir sjálvir føla tað. Men tað merkir eisini, at eg helst komi at bíða so leingi eg kann við at seta endaliga liðið, greiðir Brian Kerr frá.

Hevði alt gingið eftir hansara høvdið, so var liðið longu sett í gjárkvøldið, soleiðis at seinasta venjingin kundi brúkast til at arbeiða seinastu avtalurnar ígjøgnum.



*Landsliðsvenjarin má eftir øllum at døma bíða til evstu løtu, áðrenn seinastu brikkarnir í putlispælinum, sum telur 11 brikkar, falla upp á pláss*

Mynd: Rólant Waag Dam

## Ikki optimalar umstøður

Og júst venjingarumstøðurnar hava, aftur hesaferð, arga venjingarnar hjá landsliðnum.

– Ógvusliga regnið hevur havt við sær, at vit ikki hava fingið alt tað, vit hava ætlað, burtur úr venjingunum. Harafrat var tað okkurt smávegis roks fyrrapartin í gjár, soleiðis at vit ikki sluppu inn á lovaða vøllin, men máttu fara aðrar vegir, fortelur Brian Kerr, sum seinni í gjár hevði sínar menn á leikvøllinum, har spælast skal í kvøld.

– Hetta var ein góður vøllur og eitt gott stadion, metir landsliðsvenjarin. Talan er um ein spildurnýggjan tjóðarleikvøll, sum rúmar stívliga 16.000 fólkum. Leikvøllurin hevur bara einaferð áður hýst einum landsdysti, men tá var talan um ein venjingardyst. Hetta merkir so, at dysturin millum Slovenia og Føroyar í kvøld, er fyrsti landsdysturin av veruligum týdningi á Stožice Stadion.

rolant@sosialurin.fo